

## Ferðavinnan ímóti hvalaveiði

Samtakið hjá íslendsku ferðavinnufeløgunum harmast avgerðina hjá fráfarandi fiskimálaráðharranum, Einari K. Guðfinssyni, at heimila hvalabátum at skjóta stórhval. Ferðavinnan sigur í einum skrivi, at hvalaveiði og serstakliga stórhvalaveiði hava elvt til nógvar atfinningar ímóti Íslandi, og samtakið sigur tað vera stak óheppið, at hetta kemur oman á trupulleikarnar við umdøminum hjá íslendska fíggjarkervinum. Ferðavinnan vil hava ta komandi stjórnina at broyta avgerðina um hvalaveiði.

# Endurminningar varðveittar

**Frá Hera Kragesteen fekk Heðin Mortensen borgarstjóri í dag eitt signerað eintak av bókinini "Memoirer og Autobiografi", sum alment varð løgd fram í Posthúshjallaranum**

ENDURMINNINGAR
*Tíðindaskriv*
*www.torshavn.fo*

Tiltakið, ið var partur av 100 ára haldinum hjá Tórshavnar kommunu, varpaði ljós á havnarmannin Sámal á Kráku-steini og hansara framúr evni í skrift at lýsa samtíðina úr einum meri fólksligum sjónarhorni enn vit higartil eru von við.

Sámal hevur upplivað endan av einahandilstíðini og var ein teirra, ið kallaði inn til jólafundin í 1888.

Í endurminningunum sigur Sámal frá um at berjast fyri rættindum hjá havnarfólki, um traðir og um at rógva út.

Mads Andreas Winther, abbasonur fyrsta borgarstjóran í Tórshavnar kommunu fyri 100 árum síðani, segði livandi frá um abban og stýrdi annars skránni fyri tiltakið, ið varð hildið fyri fullum húsum.

Heri Kragesteen, langabbasonur høvundan, greiddi frá um útgávuna og søgufrøðingurin Erland Viberg Joensen hevði forvitnisliga framløgu um endurminningarnar hjá Sámali á Krákusteini og vísti myndir úr gomlu Havnini.

Tórshavnar manskór sang tríggjar sangir undir leiðslu av Bjarna Restorff, innan Sámal Tróndur Finnsson Johansen, landsskjalavørður, at enda fekk upprunahandritið til endurminningarnar í varðveitslu.

Í stuttari takkartalu gjørdi landsskjalavørðurin vart við álvaran í, at enn er eingin skipan fyri varðveitslu av talgildum tilfari.

- Tí er ikki vist, at tað, sum fólk skriva í dag kann varðveitast og takast fram um 80 ár, segði landsskjalavørðurin, tá Heri Kragesteen handaði honum stóru bókina við vøkru handskriftini hjá langabbanum Sámali á Krákusteini.



# Næmingar fáa skjótt svar

**Eitt mótmæli frá 300 Studentaskúla- og HF-næmingum varð seinasta fríggjadag handað Mentamálaráðnum. Teir kunnu vænta sær svar rættiliga skjótt**

MÓTMÆLI
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Teir umleið 300 studentaskúla- og HF-næmingar, ið hava skrivað undir eitt mótmæli, ið varð handað Mentamálaráðnum seinasta fríggjadag, kunnu nú vænta sær svar skjótt.

Mótmælið er handa Mentamálaráðnum orsakað av broytingum, ið gera at skrivliga próvtøkan í enskum og donskum kemur at síggja øðrvísi út hjá bæði studentum og HF-næmingum.

Í mótmælinum vístu tey á broytingarnar eru hugaligar og uppgávurnar síggja gott út, men at trupulleikin hjá teimum er, at tey nú í tvey og eitt hálvt ár hava arbeitt fram móti teimum skrivligu próvtøkunum, sum tær vóru áðrenn broytingina, og at um uppgávurnar koma at síggja soleiðs út, er alt tað arbeiðið dottið á gólvið.

Tann stórsti trupulleikin var tó ikki, at broytingarnar vóru gjørdar, men hinvegin at tey ikki eru blivin kunnaði um uppgávurnar fyrr enn nú, tá bert lítið hálvt ár er eftir til próvtøkurnar, og endaspurturin er settur í gongd.

### Kunnu vænta skjótt svar

Helena Dam á Neystabø, landsstýriskvinna í mentamálum, váttar, at hon hevur sett seg inn í trupulleikan, og at hon hevur spælt bóltin víðari til umsitingina í Mentamálaráðnum.

- Eg fái ikki úttalað meg enn, hvat spyrst burturúr hesum, men eg havi latið málið víðari, so tað málið er farið til viðgerðar. Eg spyrji til tað hvønn dag, so teir næmingarnir, ið sita og bíða, fáa svar so skjótt tað fyriliggur, sigur Helena Dam á Neystabø.

Landsstýriskvinnan greiðir eisini frá, at hon hevur biðið umsitingina um at skunda sær við hesum málinum, men at tað er trupult við so fáum fólkum. Hon kann heldur ikki siga, hvat fer at henda við umtalaðu uppgávunum, men hon váttar, at málið verður viðgjørt, og at næmingarnir fáa svar sum skjótast.



*Mótmælið við teimum yvir 300 undirskriftunum verður handað skrivaranum hjá Helenu Dam á Neystabø, landsstýriskvinnu í mentamálum. Næmingarnir kunnu vænta sær skjótt svar*

# Pallborðsfundur um javnstøðu

**Mánakvøldið 2. februar klokkan 19.30 skipar Javnstøðunevndin fyri almennum tiltaki um javnstøðu á Seglloftinum á Tvøroyri**

JAVNSTØÐA

Hvat skulu vit við javnstøðu? Hvat gagn hevur eitt samfelag av javnstøðu? Hvat heldur landsstýrismaðurin við ábyrgd av økinum? Hesir og aðrir spurningar um javnstøðu í Føroyum verða viðgjørdir mánakvøldið 2. februar áTvøroyri. Tá skipar Javnstøðunevndin fyri almennum pallborðsfundi um javnstøðu. Tiltakið verður á Seglloftinum.

Við pallborðið sita Jóhan Dahl, landsstýrismaður við javnstøðumálum, Annleyg Lamhauge, blaðstjóri á Kvinnu og Anna Mortensen, leiðari í Ungdómshúsinum á Tvøroyri. Tey hava hvør sína framløgu um javnstøðu, og síðani verður høvi hjá øllum at seta spurningar og at koma við hugsanum um, hvussu Javnstøðunevndin, landsstýrismaðurin og onnur kundu arbeitt við javnstøðu frameftir.

Við hesum tiltaki vónar Javnstøðunevndin at økja um kunnleikan til og áhugan fyri javnstøðuspurningunum í føroyska samfelagnum. Vónandi verða nógv fólk á Seglloftinum á Tvøroyri mánakvøldið 2. februar klokkan 19.30.

Komandi tíðina verða líknandi tiltøk í Klaksvík og í Tórshavn.

Kristianna Winther Poulsen er forkvinna í Javnstøðunevndini